

# Misbrúktu valdið

Ein avleiðing av kvettinum í miðamerikanska landinum Honduras seinasta summar er, at nú hevur løgmálaráðharrin skuldsett fleiri av landsins ovastu herleiðarum fyri valdsmisnýtslu. Ein talsmaður fyri hægstarætt sigur, at millum teir skuldsettu eru teir ovastu generalarnir í herinum, flogvápninum og herflotanum. Mannarættindafelagsskapir hava leingi kravt, at ákæra varð reist ímóti herleiðsluni fyri hennara medvirkan, tá Manuel Zelaya varð koyrdur úr forsetaembætinum og sendur av landinum. Millum annað fór herurin harðliga fram ímóti viðhaldsfólki hjá forsetanum.

# Haltar við fíggjarligu stýringini

**Eyðun Johannesen, sum hevur verið í stjórn Fiskimannafelagsins í meiri enn 20 ár, tekur fult undir við sýsluformanni felagsins í Norðoyggjum, Fríðriki Sivertsen, at fíggjarliga stýringin av felagnum ikki er á sama høga støði, sum hon hevur verið áður**

FF-VAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í lesarabrævi í Sosialinum í dag, sum hann kallar "Føroya Fiskimannafelag - ein hóvligari framferð", heldur næstformaðurin í Fiskimannafelagnum, Eyðun Johannesen, seg ikki kunna sita kúrrur longur, sum hann tekur til.

Hann vísir á, at nú formansval er í felagnum í ár, hava nøkur lesarabrøv verið í bløðunum, eitt nú frá formanni felagsins, Jan Højgaard og sýsluformanni felagsins í Norðoyggjum, Fríðriki Sivertsen.



*Eyðun Johannesen og Karl Isaksen, sum báðir eru í stjórn Fiskimannafelagsins. Eyðun, sum eigur lesarabrævið, ið sipað verður til í hesi grein, er maðurin til vinstru á myndini*

Sjálvur hevur Eyðun Johannesen verið í nevndini í Fiskimannafelagnum í meiri enn 20 ár, harav umleið 15 ár sum næstformaður.

- Eg havi alla mína tíð verið loyalur mótvegis felagnum, og ta til eina og hvørja tíð sitandi nevnd og formanni. Hesin loyalitetur hevur verið orsøkin til, at eg ikki havi ført hesi sjónarmið fram í fjølmiðlunum fyrr enn nú. Eg havi ásannað, at sjálvt felagið er tað týdningarmiklasta av øllum. Men nú kann eg ikki sita kúrrur longur, sigur hann.





*- Eg taki fult undir við tí, sum Fríðrik Sivertsen sigur um, at fíggjarliga stýringin av Fiskimannafelagnum ikki er á sama høga støði, sum hon hevur verið áður, sigur Eyðun Johannesen, næstformaður í Fiskimannafelagnum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Fíggjarstýringin

Eyðun Johannesen sigur, at hann tekur fult undir við tí, sum Fríðrik Sivertsen sigur um, at fíggjarliga stýringin av Fiskimannafelagnum ikki er á sama høga støði, sum hon hevur verið áður.

- Hesum kann eg bara vera samdur við stjórnarliminum í.

Í lesarabrævi sínum vísir næstformaðurin á, at hóast inntøkurnar hjá felagnum eru hækkaðar, er úrslitið lækkað munandi.

Næstformaðurin vísir í hesum sambandi á, at eitt nú eru sakføraraútreiðslurnar øktar munandi, tí – sum hann tekur til – at nú tykist tað at vera meginreglan, at hin harði vegurin við sakførara á odda skal roynast, áðrenn roynt verður við sanráðingum millum partarnar.

### Lekur sum sáld

Eyðun Johannesen vísir á, at eftir landsfund felagsins millum jól og nýggjár, segði Jan Højgaard við Kringvarpið, at nevndin í felagnum lekur sum ein sáld, sum hann tók til. Formaðurin segði, at Reiðarafelagið veit nágreiniliga, hvat Fiskimannafelagið ætlar at gera.

- Hesum ákærum vil eg staðiliga afturvísa, samstundis sum eg vil vísa á, at tað heldur er formaðurin sjálvur, sum er farin lætt um sannleikan, bæði í nevnd og í fjølmiðlunum.

Eyðun Johannesen ásannar í lesarabrævi sínum, at hann seinastu tíðina fleiri ferðir hevur verið ósamdur við handfaringina av fleiri málum.

Millum hesi mál nevnir næstformaðurin eitt nú Carlton-málið og málið um rækjutrolaran, Artic Viking.

### Hóvligari framferð

Eyðun heldur í lesarabrævi sínum, at fleiri av hesum málum kundu verið handfarin á ein nógv skynsamari hátt.

- Eg haldi eisini, at tað kann vera sera óheppið at siga sáttmálan upp á hvørjum ár - uttan at hava nakað átrokandi mál at fremja.

Hann vísir soleiðis á, at seinast, hetta varð gjørt, var tað í eini tíð, har reiðararnir vóru sperdir peningaliga.

- Einki komma bleiv kortini flutt í sáttmálanum, so hetta kom sera væl við hjá reiðarunum, leggur hann aftrat.

At enda í sínum lesarabrævi sigur Eyðun Johannesen seg vóna, at felagið í framtíðini kann vísa ein hóligari framferðarhátt, har fyrst verður roynt við samráðingum – í staðin fyri at byrja við at hála í táttarnar hvør á øðrum.

## Henrik Old við viðmerkingum í morgin

FF-VAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Henrik Old fer at gera viðmerkingar til Jan Højgaard í Sosialinum í morgin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sosialurin fer í morgin at hava viðmerkingar frá Henriki Old, sum hevur latið seg stillað upp til formansvalið í Fiskimannafelagnum.

Henrik Old hevur áður gjørt viðmerkingar til ymiskt av tí, sum Jan Højgaard, felagsformaður, hevur ført fram um, at hann er reiðarans maður.

Hann hevur soleiðis eisini afturvíst, at hann hevur nakað sum helst reiðaratilknýti og hevur víst á, at hann í nakrar vikur einaferð tíðliga í nítiárunum stóð skrásettur sum reiðari á skipi, tí maðurin, sum annars var reiðari, flutti av landinum.

- At menn hava átti í skipum, hevur verið vanligt um okkara leiðir – og nógva aðrastaðni við, hevur maðurin sagt, sum annars var í vinnunevnd løgtings í nógv ár og eisini eitt langt áramál var formaður í Forskotsgrunni Fiskimanna.